tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakkstein, Høgni Mohr, Niclas Johannesen

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

## Ein ruddiligari skipan – uttan peningaspekulatión

### *Oddagrein*

Tað hevur givið veruligt afturljóð, at Javnaðarflokkurin hevur tikið upp spurningin um skipanina við fiskidøgum. Tey, sum fylgja við - tað veri seg virkisráðgevarrar, løgfrøðingar og búskaparfrøðingar - ásanna, at tað fer eitt øgiligt „svans“ fram í dag og harafturat hevur spekulatiónin tikið yvirhond. Eina ruddiligari skipan

Javnaðarflokkurin ásannar, at tað verður neyvan gjørt nakað ólógligt, tá fiskidagar verða seldir. Hinvegin vísir flokkurin á, at sølan hevur nógvar óhepnar avleiðingar. Skip, sum hava lítið virði, verða handlað dýrt, tí skipið hevur veiðiloyvi og fiskidagar. Harafturat forðar henda skipanin fyri, at nýggjar ella aðrar kreftir sleppa at royna seg.

Tí mælir Javnaðarflokkurin til at skipa ein fiskidagamarknað, sum skal umsita skipanina við fiskidøgum. Flokkurin heldur, at fiskidagarnir skulu ikki seljast, men lutast út. Tað, sum ikki verður brúkt, kann loyvishavarin ikki selja øðrum, men í staðin lata fiskidagamarknaðinum aftur. Hesin kann so luta fiskidagarnar út aftur.

Verður henda skipanin sett í verk, taka vit allan spurningin um sølu og spekulatión úr skipanini. Ein annar møguleiki er, at teir skipaeigarar, sum vilja hava fiskidagar, keypa hesar fyri eitt ávíst gjald, og so mugu teir sjálvir um, um teir selja teir ella ikki. Henda møguleikan hava tveir búskaparfrøðingar nevnt.

Teir hava víst á, at tú kanst ikki selja fiskidagar, sum tú frammanundan hevur fingið. Vit skulu minnast til, at í dag fáa skipaeigarar fiskidagar, men teir kunnu vinna nógv við at selja teir aftur. Og tað kann ikki vera rætt, at landið gevur persónum ein veiðimøguleika, sum viðkomandi aftur kann selja og forvinna stórar peningamongdir fyri.

Hetta er í stríð við lógina um vinuligan fiskiskap, sum slær fast, at fiskiríkidømi er fólksins ogn. Tað merkir, at tú og eg eiga hetta tilfeingi í felagsskapi, og at felagsskapurin hjá okkum øllum, landsins stýri skal umsita hetta á mest skynsama hátt, so tilfeingið kann gagnnýtast til fulnar.

Javnaðarflokkurin hevur ikki nevnt møguleikan at leggja avgjald ella líknandi á tilfeingi ella fiskidagar, sum Jørgen Niclasen segði við Útvarpið mánadagin. Flokkurin hevur bara víst á ta óhepnu støðuna og á eina gongda leið burtur úr verandi støðu. Málið varð nógv umrøtt á landsfundi floksins, men flokkurin hevur ikki gjørt nakað liðugt uppskot. Nú verður áhugavert at hoyra, hvat aðrir flokkar og tey, sum varða av fiskivinnuni, siga til tankar Javnaðarfloksins um eina ruddiligari skipan - uttan peningaspekulatión.

***Sosialurin***

# Raðfylgjan skal vera røtt

*Býráðið í Havn skal fyrst viðgera mál, sum viðkoma Havnini, áðrenn Kommunusamskipanin tekur tey upp, heldur Heðin Mortensen, býráðslimur*

Eyðun Klakstein

Øll mál, sum viðkoma høvuðsstaðnum, skulu viðgerast í býráðnum í Havn, áðrenn Kommunusamskipanin kann taka tey upp.

Tað heldur Heðin Mortensen, býráðslimur, sum saman við hinum býráðslimunum í Sambandsflokkinum kravdi eyka býráðsfund í Havn fyri góðari viku síðani. Orsøkin var, at tað var komið fram í eini tíðindasending í Sjónvarpi Føroya, at Kommunusamskipanin hevði tosað um framtíðina hjá SEV.

Hetta kundi Sambandsflokkurin ikki góðtaka og kravdi ein eyka býráðsfund um málið.



*- Kommunusamskipanin skal ikki gerast eitt omanfyristandandi býráð, sum viðger mál, sum býráðslimir í Havn einki kenna til, sigur Heðin Mortensen, býráðslimur í Havn*

Jógvan við Keldu, borgarstjóri í Klaksvík, heldur, at býráðslimirnir í Havn lupu fram av, tí einki ítøkiligt var í tíðindunum í SEV. Býraðsformenninir høvdu bara tosa eitt sindur um SEV.

### Sett upp á pláss

- Fyri okkum var hetta ein prinsippmál, tí vit ynskja ikki, at Kommunusamskipanin skal gerast eitt omanfyristandandi býráð, sum viðger mál, sum býráðslimir í Havn einki kenna til, sigur Heðin Mortensen.

- Býráðið í Havn skal fyrst viðgera mál, sum viðkoma Havnini, áðrenn Kommunusamskipanin tekur tey upp. Tað var tað, sum vit vildu staðfesta við hesum málinum. Vit fingu ein eykabýráðsfund, har málið var umrøtt, og síðani eru eingir trupulleikar hjá Kommunusamskipanini at hyggja nærri at SEV.

- Tað er bara av týdningi, at raðfylgjan er røtt, og at býráðið í Havn veit um mál, sum Kommunusamskipanin ætlar sær at viðgera, og tað vóna vit, at vit hava sett upp á pláss við hesum, sigur Heðin Mortensen.

# Heita nú á landstýrið um at gjalda ein part av skaðunum

*Klaksvíkar kommunu heitir nú á landsstýrið um at gjalda ein part av tí upphæddini, sum tað kostar at umvæla umfatandi skaðarnar eftir glopraregnið fyri góðari viku síðani*

Eyðun Klakstein

Skaðarnir eftir glopraregnið í Klaksvík fyri 10 døgum síðani eru so umfatandi, at teir hava nú fingið Klaksvíkar kommunu at senda landsstýrinum skriv, har heitt verður á landsstýrið um at gjalda ein part av skaðunum.

Brævið, sum varð sent í gjár, er stílað til Anfinn Kallsberg, løgmann.

- Glopraregnið hevði vanlukkuligar avleiðingar í okkara kommunu, og neyðugt verður við umfatandi inntrivum á samferðslukervið í býnum og á ymsar leiðingar, sum fullkomiliga eru farnar av lagi, sigur Jógvan við Keldu, borgarstjóri í Klaksvík.

### Meira enn fýra milliónir

Tekniska umsitingin hjá Klaksvíkar kommunu hevur mett um skaðan av regninum og skriðulopunum, og hon er komin fram til, at tað í minsta lagi verður talan um 4,6 milliónir krónur.

– Hetta er ein náttúruvanlukka, sum hevur rakt okkara bý, og tí halda vit, at tað er sjálvsagt, at landskassin er við at gjalda fyri skaðarnar, sigur Jógvan við Keldu.

- Var talan um eina ella tvær milliónir, so høvdu vit ikki sent hetta skrivið til landsstýrið, skaðarnir eru so umfatandi, at vit kenna okkum noyddar at gera tað, sigur hann.

### Meira kann koma undan kavi

Tað regnaði sum ongantíð áður í Klaksvík mánadagin fyri 10 døgum síðani. Út á seinnapartin fór vatnflóð at gera um seg nógva staðni í býnum, og síðani komu skriðulopini, sum eisini gjørdu stóran skaða. Nógv hús fingu skaða, vegir og kloakkleiðingar somuleiðis.

Seinastu vikuna hevur tekniska umsitingin hjá Klaksvíkar kommunu roynt at staðfest skaðarnar og meta um, hvat umvælingarnar fara at kosta. Samlaða úrslitið er 4,6 milliónir krónur, men tekniska umsiting vísir á, at talan her um skaðar, sum tað ber til at fáa eyga á, og at tað uttan iva kemur meira undan kavi, tá umvælingararbeiðið rættiliga fer í gongd.

### Stórir skaðar

Millum stóru skaðarnar í býnum er vegurin á Helnabrekku. Har rann so nógv vatn, at gongubreyt og partur av vegnum skolaði burtur og endaði longri niðri í býnum.

Allar leiðingar, sum eru omanfyri hendan vegin, liggja nú berar, og skolað er eisini undan betonggarðum og kantsteinum, so her verður eitt stórt umvælingararbeiðið at gera. Tekniska umsiting hevur mett hendan skaðan til hálva aðru millión króur.



*Skaðarnir vóru stórir, tá tað regnaði av grimd í Klaksvík fyri góðari viku síðani. Nú heitir Klaksvíkar kommuna á landsstýrið um at gjalda fyri ein part av umfatandi skaðunum.*

**Mynd: PhotoCare**

Aðrastaðni í býnum hava ristir, deksil og asfalt fingið skaða, og eisini har er neyðugt við nógvum umvælingararbeiðið, og Úti í Grøv er stórur skaði hendur á ymiskt fríðkanararbeiði, sum er gjørt har seinnu árini. Hesin skaðin er fyribils mettur til eina slaka millión.

### Umvæla beinanvegin

Klaksvíkar kommuna heitir í skrivinum til landsstýrið á myndugleikarnar at bera ein part av kostnaðinum at fáa Klaksvíkar kommunu uppaftur á tað støðið, sum hon var undan regninum.

- Tað er sera umráðandi, at skaðarnir verða gjørdir aftur beinanvegin og ikki sleppa at liggja. Tað fer bara at koma aftur um brekku og kosta okkum seinni, sigur Jógvan við Keldu, borgarstjóri í Klaksvík.

Sama dag, sum skaðarnir hendu, var nógv arbeiði gjørt fyri at rudda vegir og forða fyri skæðum, og síðani hava fólk hjá kommununi eisini arbeitt við teimum mest átrokandi skæðunum. Hesa vikuna heldur arbeiðið fram at rudda allar vegirnar, og at spula teir reinar aftur.

Men neyðugt er við stórum umvælingararbeiðið næstu mánaðirnar, og stendur tað til Klaksvíkar kommunu, verður hetta arbeiðið lutvíst goldið av landskassanum.



# Mugu tryggja sømuliga fólkapensión

*-Vit mugu satsa meira uppá at menna Samhaldsfasta saman við eini betri fólkapensión fyri at tryggja øllum nøkur nøktandi og sømulig ellisár*

Jan Müller

Hetta sigur Kristian Magnussen, løgtingsmaður og umboð Javnaðarfloksins í Trivnaðarnevndini eftir at Javnaðarflokkurin um vikuskiftið hevði landsstevnu. Á hesi stevnu vóru sosial- og almannamál eisini nógv frammi, og varð m.a. funnist at tingmanningini fyri ikki at gera nokk við sosialpolitikkin.

Kristian Magnussen, sum sjálvur eitt skifti var landsstýrismaður í almannamálum sigur, at hetta er nakað hann hevur tikið til eftirtektar og vil hann gera sítt til, at hesi mál verða hægri raðfest.

Hann sigur annars, at tað er sera ringt at gera sær eina meting av, hvat tað er, sum samgongan arbeiðir við á eitt nú pensiónsøkinum. - Her er nógv tos, og tað verður sagt, at okkurt er á veg. Men helvtin av samgongutíðini er farin, og enn vita vit ikki, hvat landsstýrið ætlar. Tað, sum er sagt, er, at lønmóttakarar skulu kunna draga frá óavmarkað av tí, sum teir fortjena. Tvs.



*Kristian Magnussen, tingmaður vil fegin vita, hvat verður av øllum pensiónstosinum hjá landsstýrinum, nú valskeiðið er meira enn hálvrunnið*

at tey, sum tjena nógv og harvið kunnu seta av til eina fólkapensión, ellistrygging ella hvat hetta kann eita, tey skulu fáa ein stóran skattafrádrátt. Fáa tey tað, so má onkur annar betala meira í skatti. Kristian Magnussen vísir á, at tað sær ikki mætari út enn, at tað er ætlanin hjá landsstýrinum, at munurin, sum verður gjørdur á fólki í arbeiðslívinum, skal førast víðari yvir í pensiónstilveruna. Og tað kann hann á ongan hátt taka undir við.

Kristian Magnussen er sannførdur um, at besti vegurin at ganga er at betra um verandi fólkapensiónina og bøta um skipanina við Samhaldsfasta. Tað er tann mest rættvísa leiðin at ganga, tí tá kunnu ellisárini tryggjast hjá øllum borgarum á jøvnum føti uttan mun til, hvørja inntøku teir hava arbeiðsárini. Vit mugu ikki koma hartil, at tað verður gjørdur munur á møguleikum og rættindum hjá fólki, sum koma í ellisárini - út frá tí støðu tey hava havt á arbeiðsmarknaðinum.

### Harmur um fakfeløgini

Hann dylur heldur ikki fyri ónøgd sína við, at eitt nú fakfeløgini sjálvi hava tikið stig til eftirlønarskipanir.

Fakfeløgini áttu ongantíð sjálvi at tikið stig til egnar tryggingar.

– Við hesum hava fakfeløgini eisini sjálvi verið við til at grivið eina grøv fyri fólkapensiónina. Ístaðin fyri at royna at leggja trýst á politikararnar fyri at fáa pensiónina upp, so hava tey góðtikið at brúka sína egnu løn partvíst til at spara upp ískoyti til pensiónina. Soleiðis er tað farið meira og meira tann vegin.

Og tá tað ikki hevur verið lagt nakað trýst á politikararnar frá fólki, sum eru virkin á arbeiðsmarknaðinum, til at halda pensiónirnar ajour, so hevur man politiskt kanska ikki kent serliga trongd til at gera nakað. Høvdu hesi fólkini heldur sett hesi prosentini inn í eina kollektiva fólkapensión, so hevði tað kanska verið komið meira burtur úr. -Og hvør kann við 100% vissu tryggja fólki, sum seta pengar í eftirlønarskipanir, at tey fáa eitt avkast tá avtornar, at tey ikki missa sínar pengar! Partur av hesum pengum verður jú plaseraður onkunstaðni, eitt nú á virðisbrævamarknaðum, sum vit vita kunnu vera svikaligir.

Kristian Magnussen ivast annars í, um tað ber til at venda við aftur nú. Hann heldur hetta vera stórt spell, tí tey, sum fara at hava mest brúk fyri fólkapensión framyvir, eru tey, sum hava havt lítið ella einki tilknýti til arbeiðsmarknaðin. Tey koma tí at hava enn minni møguleika at leggja trýst.

-Tí mugu vit politiskt tryggja teimum, soleiðis at tey koma at hava eina sømiliga fólkapensión.

Hvat viðvíkur dagsins fólkapensión, so heldur Kristian Magnussen, at tað er torført at generalisera, tí summi klára seg og onnur gera tað ikki. Men tað eldra ættarliðið, sum hevur spart alt sítt lív, gerast væl eisini minni og minni.

# Ikki ráðiligt at skerja blokk nú

Jan Müller

Nú nógv hevur verið tosað um at skerja blokkin úr Danmark sohvørt búskapurin batnar, so heldur Kristian Magnussen, fram-søgumaður Javnaðarfloksins í sosialmálum, at tað er púra burturvið at tosa um at skerja ella kuta av blokkinum, nú so nógv stendur í hálvum gekki í Føroyum.

– Tá tað verður tosað um at skerja blokkin, so hugsi eg ikki, at tað er ráðiligt at gera tað, fyrr enn man hevur fingið vælferðarstigið í Føroyum upp á eitt støði, sum líkist tí í grannalondunum. Og tað er tað so avgjørt ikki í dag.

Kristian Magnussen vísir á, at sum støðan er á almanna- og heilsuøkinum í Føroyum í dag, so er nógv niðurslitið.

Sjúkrahúsverkið er t.d. ikki væl fyri. Ábøtur eru neyðugar innan nógvar ymsar skipanir eitt nú røktarskipanir innan almannaverkið. – Okkum tørvar rættiliga nógv røktar- og ellisheimspláss bara fyri at nøkta verandi tørv. Kommunan í Havn gjørdi stóra kanning herfyri, og kom eftir, at at tað manglaðu eini 60 pláss bara í Havn. Talið fyri allar Føroyar eru í hvussu er tað dupulta heldur tingmaðurin, sum vísir á, at tað skulu brúkast einar120 mill. kr. fyri bara at nøkta tørvin á ellis- og røktarheimsplássum í dag. Hartil koma øktar rakstrarútreiðslur uppá einr 40 mill. kr. um árið. Eisini á mongum øðrum økjum eru vit afturútsigld. Avlamispensiónin t.d. er nógv lægri hjá okkum enn í londunum rundan um okkum.

### Kynisma

Kristian Magnussen brúkar orðið kynisma um støðuna í dag, har landsstýrið - um somu tíð sum tað tosar um at kuta blokkin burtur, hevur stórt yvirskot í landskassanum og ikki vil gera nakað munandi fyri at betra um støðuna á almanna- og heilsuøkinum.

– Vit kundu havt gjørt so nógv ting betri, tá hugsað verður um støðuna hjá landskassanum. Landsstýrið tosar um at hava loft á íløgunum, tí tað skal yvirupphita búskapin. Tað er rætt, tá tað um ávísar íløgur ræður. Men tá tað kemur til eitt niðurslitið almanna- og heilsuverk er hetta ikki rætta gongdin. Eg haldi, at nettupp í slíkum tíðum, har man hevur pengarnar, kundi man gjørt íløgur í slíkt, sum ikki yvirupphitar búskapin. Eitt nú hildið sjúkrahúsið ajour við medicotekniskum tólum. Tað yvirupphitar ikki búskapin. Man kundi valt nakrar íløgur, sum ikki høvdu økt virksemi við sær.

# Tarvurin skal avgera hvør fær hann

*Ein tarvur stendur upp á spæl í Fuglafirði um vikuskifti, og avlopið hjá tarvinum avger, hvør fær tarvin*

**Fuglafjørður:** Leygardagin verður ein 15 mánaðar gamal tarvur sleptur inn á eitt øki niðanfyri Handilsskúlan á Kambsdali, og tarvurin skal síðani gera av, hvør skal eiga hann.

Tað er svimjifelagið í Fuglafirði, sum skipar fyri neytalortakapping, tey kalla, og í løtuni fer sølan av lutaseðlum fram. Lutaseðlarnir eru nú ikki eitt pappírspetti, men ein teigur á tí økinum, har tarvurin skal sleppast. Økið verður býtt upp í so nógvar teigar, sum fólk hava hug at keypa, og tann fyrsti lorturin, sum kemur úr tarvinum avgerð, hvør teigur hevur vunnið kappingina.

Vinningurin er tarvurin, sum verður flettur sama dag sum kappingin er.

Fólk kunnu nú keypa teigar á økinum á Kambsdali, og leygardagin kl. 15.00 verður tarvurin sendur inn á økið at gera sína uppgávu í spælinum.

**ek**

# Pallborðsfundur um barnaansing í Havn

Í sambandið við býráðsvalið í november, skipar Foreldrafelagið í Havn fyri pallborðsfundi í Norðurlandahúsinum mikudagin 27. november kl. 19.30.

Evnið á fundinum verður: „Er barnaansingin bara valagn?”.

Hetta átti at tala til ein hóp av borgarunum, bæði teir ið hava trupulleikan nú og teir, ið kunnu vænta sær trupulleikan í næsta valskeiðið.

Umboð frá øllum flokkum, sum stilla upp til býráðsvalið í Havn, verða við á fundinum.

Ætlanin hjá foreldrafelagnum er at minna núverandi býráðspolitikarar á avrik teirra í farna valskeiði og seta spurnartekin við tey vallyfti, vit eru vitni til í hesum døgum.

Foreldrafelagið vónar at nógv fólk fara at stuðla tiltakinum, hetta verið seg bæði foreldur og onnur áhugað, sigur Foreldrafelagið í Havn.